Vísindi og frásøgn

Vísindafólk tosa í nógvum førm eitt mál, sum vanligi leikmaðurin hevur ilt við at skilja. Hetta er kanska ikki nakar trupulleiki, tá vísindafólk lata frágreiðingar sínar til fólk, sum eru von við at lesa slíkt, men skulu frágreiðingarnar eisini vera skilligar hjá vanligum fólki, verður talan ofta um trupulleikar.

Í nútíðarsamfelagnum hevur formidling fingið alsamt øktan týdning í gerandisdegnum. Eisini hjá vísindafólki er tørvurin um at kunna onnur um úrslitini av gransking øktur. Bæði tá einstaki granskarin skal kunna sín stovn um úrslit síni, men eisini tá granskarin og/ella stovnurin skal lata úrslitini út tvørtur um fakmørk ella til almenningin.

Við hesum fyri eyga fór Fróðskaparsetur Føroya á heysti í fjør undir skeið um formidling, har endamálið var at læra næmingarnar tey grundleggjandi tingini um formidling og samskifti sum heild. Við støði í almennari ástøði um formidling og við venjingum annars skuldu næmingarnir læra, hvussu hesi á ein fangandi og áhugaverdan hátt bera síni úrslit fram fyri ymiskum móttakarum. Tað var Bjørt Samuelsen, journalistur, sum á frálíkan hátt stóð fyri skeiðnum.

Undir hesum varð serligur dentur lagdur á sonevndu populervísindaliga partin, og komandi átta leygardagarnar fær lesarin her í blaðnum møguleika at staðfesta, í hvønn mun frálæran hevur eydnast. Átta av teimum uppgávum, sum vórðu skrivaðar í sambandi við skeiðið, verða nevnliga prentað komandi leygardagsbløðini, og er talan um greinar, sum sjálvsagt fyrst og fremst eru vísindaliga grundaðar, men sum samstundis eru skrivaðar á slíkan hátt, at hetta er bæði skilligt og fangandi hjá vanligum leikfólki.

Í fyrstu greinini, sum er prentað í blaðnum í dag, er tað Eyðfinn Magnussen, sum skrivar um, hvussu tað ikki altíð er nakar fyrimunur at vera størstur í náttúruni og serliga í sjónum. Ikki óvæntað er tað eisini hvíð kring okkum, sum eigur størsta partin í greinarøðini, og koma vit er at frætta um, hvussu fiskur ferðast, um serskóltar í sjónum og hvussu æti í sjónum er grundarlag fyri tilfeinginum kring okkum. Rúm er tó eisini fyri øðrum evnum, og koma vit seinni at frætta meira um fyribrigdið við oman- og skriðulopum, umframt eina burgbarabakteriu, sum kann vera heilt vandamikil.

sosialurin

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn,
telefon 341800, telefax 341801,
teldupostur: post@sosialurin.fo

Móðir og dóttir spæla klovnar

– Hetta dámar okkum sera væl, og onki er so gott sum at síggja glað børn, siga tær báðar Kaktus og Albinus ella Marjun og Silvia, sum sjálvbodnar upptraðka sum klovnar til ymisk tiltøk. Tað byrjaði mest sum av tilvild, men tær eru vorðnar sera vælumtóktar kring landið

Kaktus og Albinus - alias Marjun og Silvia - í støtinum

SAMRØÐA
Orð: Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo
Myndir: Álvur Haraldsen

Í eina tíð nú hava ein móðir og ein dóttir av Signabø gingið runt og bókstaviliga spælt klovnar. Tær upptraðka íklæddar sum tveir fittir klovnar til barnaføðingardagar og onnur serlig tiltøk. Eisini koma tær av og á óvæntaða vitjan á stovnum.

– Hetta byrjaði mest sum av tilvild. Tað var ein kona, sum vit kenna, sum so øgiliga fegin vildi finna uppá okkurt stuttligt til føðingardagin hjá dóttrini, og so spurdi hon meg, um eg kundi finna uppá okkurt, greiðir Marjun Gunnarson frá.

Hon ringdi so til dóttrina hjá sær, Silviu, og saman funnu tær upp á at klæða seg út sum klovnar, og so fóru tær í føðingardag. Og tær vaktu mikla gleði millum børnini.

Marjun hevur arbeitt við børnum í mong ár og er námsfrøðingur. Sjálv sigur hon, at henni altíð hevur dámt væl at undirhildið.

– Ein kann siga, at eg havi altíð spælt klovn, bara ikki íkløddd sum ein, so tað var so líkatil, heldur hon skemtandi fyri.

Silvia gekk beinanvegin við til tað – tó við tí treyt, at mamman eisini kom við.

Tann fyrsta framførslan gekk upp á stás, og so var bólturin farin á rull. Tað frættist skjótt, hvat tær gera, og tað kemur ofta fyri, at tað verður ringt eftir teimum.

Kræsna fjøld

Tær báðar siga, at tað var torført í byrjanini at sjálvar skula standa fyri framførsluni. Onki handrit at halda seg til ella nakað.

– Tað verður ofta nokk so tilvildarligt av tí sama, men tað gongur fínt, sigur Silvia, sum hevur royngt seg innan sjónleik.

Báðar leggja tær dent á, at tað er torført at framføra, tá áhoyrarafjøldin eru børn.

– Børn eru sanniliga krævnir áskoðarar, so tað er ikki bara bara, sigur Marjun.

Tað veldst eisini um, hvat tað eru fyri børn tær vitja. Um tað eru størri børn ella heilt smá.

Tá tað eru størri børn, koma tær inn við einum braki. Tónleik hart frá og harðliga og klossut fram. Men tað kunnu tær ikki, tá tað eru smábørn, tí tey verða bangin. So tær koma heldur varðligari inn og teska. Eisini hava tær funnið upp á at nýta Pingumál, tí tað kenna flestu lítil børn í dag.

– Tað ræður um at vinna álitið hjá børnunum og fáa tey at verða trygg, tá verður tað ofta sera stuttligt, siga tær við ein munn.

Eisini leggja tær seg eftir at fáa tey meiri afturhaldandi børnini við. Ofta velja tær børn út, sum halda seg aftan fyri, soleiðis at hesi síggja, at tey eisini sleppa við, fyri tað um tey ikki halda seg framat.

Tá vit eru komnar í búnan og eru farnar út, klára vit ikki bara at steðga eftir eina framførslu, siga Kaktus og Albinus

Barnastøði

Marjun og Silvia siga, at Hannibal er øgiliga vældámdur millum børn. Hvørjaferð tær eru úti, spyrja børn, um tær kenna Hannibal. Og tær svara sjálvandi ja.

Tær royna altíð at halda seg til støðið hjá børnunum. Tær halda seg í millum tey, meðan tær framføra, og taka børnini, sum vilja tað, upp.

Hvør framførsla endar við, at tær geva børnunum okkurt gott.

– Tað er so lívsjáttandi at kunna fáa børn at flenna, sigur Marjun. Og báðar siga tær, at tað er lønin í sjálvum sær.

Eisini hava tær fingið nógv rós fyri teirra framførslur, har tær hava verið. Tað, sum kanska er serliga stuttligt, er, at um tær verða bidnar at koma til eitthvørt, so fara tær ongantíð beina leið heim, tá tað er liðugt. Tá leggja tær altíð leiðina fram við onkrum barnagarði ella líknandi.

– Tá vit eru komnar í klæðini og lagið er í topp, so er tað ikki so lætt at tveita búnan beinanveg. Ein kemur ikki niður aftur á jørðina umgangandi, so tá nýta vit høvi til at fara út at onnur, greiðir Silvia frá. Hon sigur, at tær klára ikki at steðga aftur aftaná bara eina framførslu, og tí fara tær ofta til eini tvey ella trý støð, tá tær eru úti.

Nógvur tónleikur, róp og skemt er millum annað á skránni, tá tær báðar fara út at vitja børn. Men er talan um smærri børn, gongur tað meiri stillisliga fyri seg

Fólk heilsa

Meðan prátið gongur sást væl á bæði móður og dóttur, at teimum dámar væl at gera hetta. Somuleiðis tosa tær næstan um kapp, og harvið fær ein ta fatanina, at her eru tvær, sum sampakka væl. Tær halda, at tað er ein fyrimunur, at tær kennast so væl, tí so megna tær at lofta mest sum einum hvørjum óvænta, sum kann henda, tá framført verður so spontant.

Tær greiða frá, at fólk altíð eru so blíð og glað, tá tær koma. Tær koyra við egnum bili frá staði til stað, og tær uppliva ferð eftir ferð, at fólk kenna bilin aftur og vinka til teirra.

– Summi hyggja øgiliga nógv, tá tey síggja tveir klovnar, sum koyra bil, men flestu smílast ella flenna, tá tey síggja okkum, sigur Marjun.

Silvia nikkar samtykkjandi, meðan hon sigur, at tað, at tær eru smurdar og hava eitt slag av masku, ger tað munandi lættari at spæla.

Tað er ein rokan í fjøruni, tá tær báðar gera seg klárar til at framføra

Vitjaðu barnadeildina

Marjun og Silvia hava sum sagt verið nógvastaðni og vitjað nú. Tær hava fleiri stuttligar og góðar løtur at greiða frá. Men tær eru á einum máli um, at ein tann stuttligasta og besta løtan, sum tær hava havt var, tá tær vitjaðu menningartarnað.

– Tey vóru so glað og dansaðu allatíðina, fløgan spældi umaftur og umaftur, greiðir Silvia flennandi frá.

– Slíka lívsgleði áttu vit øll at havt, sigur Marjun við eitt sindur av álvarsemi aftanfyri.

Herfyri vóru tær eisini og vitjaðu barnadeildina á Landssjúkrahúsinum.

Hesa vitjanina løgdu tær meira tilrættis enn aðrar. BR stuðlaði teimum við pakkum til børnini.

Marjun greiðir frá, at tað var nakað heilt serligt at uppliva gleðina hjá sjúku børnunum. Tey livnaðu upp.

– Eg minnist serliga væl tann eina drongin. Hann var júst komin av skurðborðinum, og hann græt illa. Men tá vit høvdu verið har og fjasað saman við teimum og so skuldu avstað aftur, sat sami drongurin vælnøgdur í seingini og flenti. Mamma hansara smíltist so hjartansfegin til okkum og segði, at vit høvdu bjargað degnum hjá honum. Slíkt fløvar, sigur Marjun.

Børnini íblástur

Tær báðar siga, at tað hava altíð verið nógv børn rundan um tær, og tað er frá teimum, at íblásturin til hetta "starvið" er komið.

Tá tær skulu út, er tað ein hurlivasi rundan um tær. Tær rokast við at broyta seg sjálvar frá at vera Marjun og Silvia til at verða Kaktus og Albinus.

Tær hava tónleikin sera hart frá, fjasa nógv sínámillum og rýma frá øllum rokilsinum í rúminum, tá tær eru tilreiðar.

Og so fara tær avstað við bilinum. Ein dagin hevði Marjun ella Kaktus gloymt at keypt okkurt, so tær steðgaðu í Mylnuni, og hon leyp inn.

– Fólk stóðu bara og gløddu at mær, tá eg kom inn. Ein klovnur kom at keypa, tað var stuttligt. Og ongin kendi meg aftur heldur, greiðir Marjun stórflennandi frá.

Hvussu longi tær fara at halda fram við hesum, duga tær ikki at siga.

– So longi sum vit tíma, siga tær í senn. Tær leggja dent á, at hetta er ikki nakað, sum tær gera fyri at vinna pening. Tær eru glaðar, tá børnini eru glað. Og meginpartin av útreiðslunum, sum hava staðist av hesum, rinda tær sjálvar fyri. Higartil hava tær lánt búnarnar, sum tær eru í, men skjótt fara tær at fáa egnar búnar, sum Sonja Design fer at gera og lata teimum sum stuðul.

– Um hetta var nakað, sum vit gjørdu fyri pengar, ella tí vit vórðu settar at gera tað, so hevði hetta blivið til eitt starv sum øll onnur. Nevniliga tað, at hetta er sjálvboðið, ger, at tað er so ótrúliga stuttligt, sigur Silvia ella Albinus, sum hon eitur, tá hon er klovnur. Og mamma hennara Marjun ella Kaktus nikkar smílandi.

– Kaktus og Albinus eru nøgdir, tá fólk smílast og eru glað, siga teir báðir klovnarnir úr Signabø.